Vinnunevnd Føroya Løgtings
Hoyringarfundur LM 99/2023

Tórshavn 29. apríl 2024

Viðmerkingar til uppskot um burðardygga ferðavinnu

Verandi samgonga hevur nýliga samtykt Ll. nr. 70 frá 2023 um náttúruvernd. Sambært § 1 er endamálið við løgtingslógini at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

Altjóða gransking hevur prógvað, at atgongd til náttúruna hevur alstóran týdning fyri fólkaheilsu, sjálvbjargni og trivnað. Samsvarandi hesum heldur Hagafelagið, at ein av týdningarmestu uppgávunum hjá politisku skipanini er at tryggja grundleggjandi rættin hjá okkum og okkara eftirkomarum til fría og ókeypis atgongd til náttúruna, ið líkist skipanini, ið okkara grannar hava.

Áðrenn dyrking og bóndasamfeløg tóku seg upp, vita vit at atgongdin til náttúruna og hennara gávur var frí í germansku londunum, sum vit eru partur av. Seinni vórðu avmarkingar gjørdar við viðtøkum um nýtslurætt fyri at gera dyrking og aðra nýtslu gjørliga. Hetta er útgangsstøðið. Møguligar avmarkingar av atgongd til náttúruna skulu tí vera proportionellar og við atliti at náttúruni, umframt at rímiligum og veruligum tørvi til at útinna ávíst virksemi ávísan dag, og har virksemið kann verða beinleiðis órógvað, t.d. í sambandi við fjallgongu. Hinvegin skal tað ikki bera til at lata hagar fullkomiliga aftur í longri tíðarskeið, t.d. í lembingar- og harutíð, sum hevði útihýst atgongd hjá almenninginum til náttúruna í órímuligan mun.

Í Norðurlondum dámar okkum at siga, at alramannarætturin er ein serstakur norðurlendskur rættur, men hetta er ikki so, sigur Håvard Steinsholt, førsteamanuensis á Norges miljø og biovitenskapelige universitet (NMBU), í fyrlestri á IFLA World Congress 2019[1]. Í flestu londum í heiminum er tað ein vanligur rættur at ferðast frítt til gongu. Hann greiðir víðari frá, at í Noregi er ólógligt at taka pening frá fólki til gongu, tí **gongurættur er ikki knýttur at ognarrætti**. Eigari hevur nógv rættindi knýtt at ognini, men **flytføri er ikki ein framíhjárættur hjá eigara**. Eisini Marianne Reusch, sum er PhD í "rettsvitenskap", og sum hevur skrivað bókina Allemannsretten Friluftslivets rettsgrunnlag[2], hevur kannað, hvussu vanligur alramannarættur er í øðrum londum. Í bókini verður hugtakið **alramannarættur** lýstur sum **rætturin, ið øll hava, til at dvølja, at flyta seg og vera virkin í náttúruni óheft av ognarrættinum**. Alramannarætturin er djúpt rótfestur í nógvum londum, eitt nú í Sveis, Eysturríki og Skotlandi. Víðari sigur Reusch, at meðan rætturin í Noregi til at ganga "allastaðni" er knýttur til ódyrkað lendi, sonevnda "utmark", brýtur danski gongurætturin frá. Sambært donsku natúrverndarlógini er gongurætturin knýttur at ávísum slagi av náttúru við ymiskum reglum fyri strendur, skóg, ódyrkað lendi og vegir og gøtur "i det åbne land" (kap. 4 í Naturbeskyttelsesloven um "Offentlighedens adgang til naturen")[3].

Um farið verður aftur í tíð til miðøldina, staðfestir Landslóg Magnusar kong Lógbøtara frá 1274 rættin at ferðast frítt og heysta av tilfeinginum, ið náttúran gevur, umframt at lógin eisini verjir fátøk og gevur

[1] Leinki til framløgu hjá Håvard Steinsholt á ráðstevnu hjá IFLA World Congress 2019 Common Ground 18 - 20 Sept. Oslo, Norway í 2019 (umleið 8:50 min. inn í framløguna): https://www.youtube.com/watch?v=svwZU2-wF1Y
[2] Reusch, Marianne (2012). *Allemannsretten. Friluftslivets rettsgrunnlag*. 1. útg. Flux forlag.
[3] Sí s. 105-109 í Reusch (2012).

kvinnum arvarætt[4]. Landslógin var eisini galdandi í Føroyum í meir enn 400 ár, og er Seyðabrævið frá 1298 partur av sama lógarverki. Í umrøðu av Ferðavinnulógini 19. mars 2024 umrøddi Karlot Hergeirsson, løgtingsmaður, menningina frá bóndafamfelag til fiskivinnusamfelag og legði áherðslu á, at alramannarætturin varð staðfestur longu í Seyðabrævinum. Seinni versnaðu umstøðurnar hjá ognarleysum føroyingum alsamt, og kom kúganin í hæddina við trælalógini frá 1777, sum ásetti at maður skuldi eiga minst ½ mørk av jørð fyri at giftast og seta búgv. Tá trælabandið og eisini bátsbandið seinni blivu strikað, sum partur av rød av liberaliseringum, elvdi tað til djúptøkna menning av samfelagnum og stóran fólkavøkstur.

Hví nevna vit søguligu gongdina? Jú, tað er tí at vit vilja ávara tykkum, okkara fólkavaldu politikarum, ímóti at knýta gongurætt og ognarrætt saman í ferðavinnuhøpi. Vit hava áður merkt, hvat tað kostar at liggja undir treytunum, ið bøndur og festarar seta. Um bøndur og festarar frammihjá gera av, hvør sleppur út í náttúruna, nær og enntá at rindast skal fyri atgongd, flyta vit okkum burtur frá týðandi fólkaræðisligum meginreglum, har jørð ikki er eitt legitimt valdsráð.

Tíðin er búgvin til, at atgongd til náttúruna fyri ein og hvønn verður lógarásett í nútímans lóggávu. Hagafelagið heldur ikki, at broytingin í § 41 í Lov om Hegn og Markfred frá 1937 gevur nóg góða verju av atgongdini hjá landsins íbúgvum til náttúruna. Í viðmerkingunum til Ferðavinnulógina verður víst á, at landbúnaðarlóggávan er ótíðarhóskandi og ikki egnað til at skipa gongd í náttúruni. Landbúnaðarlóggávan er gomul, og tað er óvist, hvussu hon skal tulkast.

Bóndafelagið og Óðalsfelagið siga seg ynskja at halda fast í Lov om Hegn og Markfred og so tulka lógina pragmatiskt, soleiðis at føroyingar skulu hava frítt at fara. Hvat merkir tað *at tulka lógina pragmatiskt*? Í august í fjør blivu tveir føroyingar meldaðir fyri at fara í hagan í Kunoy. Nýliga er málið tó slept. Hagafelagið hevur fingið innlit, og grundgevingin hjá politinum fyri at sleppa málinum, er "at gongd í haga ikki revsast, tá ið tey, sum eiga hagan, ikki frammanundan hava boðað óviðkomandi frá, at tey ikki skulu fara í hagan."[5] Politiið tulkar lóg um Hegn og Markfred soleiðis, at eigari av jørð einsæris kann gera av, um ella við hvørjum treytum viðkomandi vil loyva óviðkomandi at sleppa í hagan. Hvussu frítt er tað so hjá føroyingum at sleppa út í náttúruna, og er uppskotið hjá jarðeigarum og festarum nøkur loysn?

Ferðafólk, eisini føroyingar, seta síni fótafar í øllum londum, har tey vitja í stórum tali. Í Føroyum eru tað eisini nøkur støð og bygdir, ið merkja trýstið. Tað er tí av stórum týdningi, at inntøkur frá ferðavinnugjaldi í høvuðsheitum verða veittar til at bøta um tað fótafar, ið ferðafólk seta í okkara landi. Sum grundregla er Hagafelagið ímóti, at landið gevur stuðul, ið ikki er eyðmerktur til ávíst tiltak, ið eitt nú kann bøta um fótafar frá ferðavinnuni. Tí tørvurin er stórur á at bøta um infrakervið í náttúruni, og væntaðu inntøkurnar røkka neyvan nóg langt.

Hagafelagið heldur, at insitamentið til at hava brúksrætt til jørð í Føroyum, eigur at vera ynski um at reka og menna landbúnað, at framleiða matvørur – og ikki eitt ynski um at vinna pening burturúr atgongugjaldi til náttúruna. Fólk, sum hava jørð um hendi, bæði landsjørð og ognarjørð, hava serliga góðar møguleikar til at vinna pening við at bjóða tænastur út til ferðandi, skipa fyri túrum, siga søgur osfr. Gongugjald er ikki ein tænasta.

Hagafelagið tekur tí ikki undir við ætlanunum um at veita eigarum og festarum ein part av skattainntøkum frá ferðafólki, ið vitja í Føroyum. Tað er ein sannroynd, at ofta búgva jarðeigarar ikki á bygd. Tað ger tað eyka torført at tala fyri og mótvegis ferðafólki at verja tillutan av skatti til jarðeigarar. Eisini tí, at ætlanin ikki er at

[4] Landslovjublieet – Norsk Nasjonalbibliotek https://www.nb.no/landslovjubileet2024/
[5] Bræv frá Føroya politi dagfest 09.04.2024 (skrás. nr.: 2024-065533)

seta treytir og krøv um, hvat hesin peningur verður brúktur til. Um stuðul verður veittur jarðeigarum, ið hava nógvar ferðafólkavitjanir, uttan at treytir um at bøta um umstøðurnar hjá ferðafólkum og/ella bygdafólkum fylgja við peninginum, kann tað heldur ikki forsvara grundgevingarnar um, at ferðavinnugjaldið er gjald, ið fer til at bøta um neiliga ávirkanina, ið ferðafólk hava á eitt nú náttúru og bygdalív.

Heldur eigur landbúnaðurin saman við fiskivinnuni at arbeiða fyri øktum sjálvbjargni við eginframleiddum matvørum. Um áherðslan verður flutt frá at menna landbúnaðin til, at ferðafólk í staðin verða "mjólkineyt", er vandi fyri, at vit als ikki røkka størri sjálvbjargni. Harumframt er vandin eisini, at prísurin á jørð hækkar, og at jørðin í vælumtóktum økjum verður mið hjá peningasterkum fólki og feløgum at gera íløgu í, sum ikki hava menning av landbúnaði og framleiðslu av matvørum sum mál. At lata ein part av ferðafólkaavgjaldi til festarar og jarðeigarar kann skunda undir verandi gongd, at jørð fer úr hondum á fólki í heimaøkjum, har nógv ferðafólk vitja, til býarfólk og størri fyritøkur.

Land og kommunur mugu eisini síggja gøtur í náttúruni sum ein natúrligan part av samferðslukervinum og játta pengar til viðlíkahald av teimum. Íløgur í gøtur skulu síggjast sum íløgur í fólkaheilsu og trivnað í heimaøkinum og gevur fleiri, t.d. eldri og fólk við avmarkaðum rørslumøguleikum, betri atgongd til at njóta náttúruna.

Vinaliga

Rúna Hjelm

Rúna Hjelm
Forkvinna í Hagafelag Føroya